## Veturin á veg?

Eins og í Føroyum hevur tað verið óvanliga lýtt í Danmark higartil í vetur við vindi og regni, men nú siga veðurmenninir, at ein broyting er á veg. Teir siga, at næsta vikuskiftið fer eitt lágtrýst fram við Danmark norðanfyri, og at tað fer at hava kaldari luft við sær. Veðurmenninir vænta, at tað verður frost um dagin, og at tað fer at frysta eini fimm stig um næturnar. Kemur nakað avfall við lágtrýstinum, verður tað fyrsti kavin í vetur.

## Sambygd hús

Menn eru nú farnir at grava út fyri 15 sambygdum húsum, sum skulu byggjast í Ánunum. Tað er felagið JFT Contractors, ið stendur fyri bygg-ingini, og húsini hevur arkitektafelagið Magnus Hansen teknað. Húsasølan hjá Eik, Inni, fer um stutta tíð at skipa fyri einum kunnandi fundi, har fólk fáa meiri at vita um húsini, ið verða í tveimum støddum, ávikavist 104 og 115 fermetrar. Ætlanin er, at tey fyrstu skulu flyta inn í august í ár.

*(Kelda: www.nordlysid.fo)*



*Umheimurin hevur latið eyguni upp fyri 200, men á Planet Awards verður høvi at hoyra bólkin á heimavølli*

*mynd: nud*

# Føroyskir topp bólkar á Planet Awards

**Tá Planet Awards fer av bakkastokki 27. januar verður tað m.a. við tónum frá nøkrum av best umtóktu føroysku bólkunum. 200, The Dreams og Páll Finnur Páll fara á pall.**



*Hittmaskinan hjá The Dreams fer uttan iva at fáa lív í gallaveitsluna á Hotel Føroyum*

*mynd: nud*

PLANET AWARDS

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

The Dreams hava við fløguni Tazy verið bólkurin handan flestu landaplágurnar farna árið. Punkaði føroyski sangskatturin hevur fangað ung sum eldri. Hóast talan er um lániløg, so hava The Dreams megnað at gera tey egin. Løgini Sasa Sa, Sa og Nummar hava dominerað 15 tær bestu, men øll hini løgini hava fangað á onkran hátt. Á Nýggjárskonsertini fingu The Dreams alt í kók, og á Planet Awards verður ivaleyst sami endi. Hetta verður eitt frálíkt høvið at fáa sær ein svingom í gallakjólum og klædningum.

Páll Finnur Páll hevur seinasta árið spælt fleiri minniligar konsertir, og ummælararnir hava ikki spart upp á lýsingarorðini, og tá Páll Finnur Páll fer á pall, er syngið við góðskan altíð høg. Konsertirnar á G!Festivalinum og á Summarfestivalinum vóru millum ársins framførslur í Føroyum í fjør, og var ein planet til bestu konsert á árinum, høvdu hesar ivaleyst verið millum tilnevningarnar. So fyri tey, ið leita sær á Planet Awards er gott í væntu.

Páll Finnur Páll arbeiðir við ætlanum um eina nýggja útgávu, ið væl kann gerast tann síðsta hjá bólkinum. Eftir fleiri sera virkin ár á tónleikapallinum er longri og longri millum framførslurnar hjá teimum, og alt oftari er tað onkur av limunum, ið framførur solo. Men á Planet Awards eru teir aftur á sama palli.

Fløgan hjá 200 Graceland hevur veruliga fingið umheimin at lata eyguni upp fyri Føroyameistarunum í politiskum punki. Lagið Exodus (2015) er júst komið á íslendsku rokksavnsfløguna Rokkland, og árið 2007 kann gerast eitt tað mest spennandi í søguni hjá bólkinum. Í fjør gjørdi bólkurin vart við seg á Roskilde Festivalinum, har teir fingu eitt av bestu ummælunum av øllum bólkunum á festivalinum. Umheimurin heldur eyga við teimum, og tað er sannlíkt at føroyski punkurin verður at hoyra á fleiri útlendskum festivalum í ár.

Frammanundan er greitt, at danin Bryan Rice verður millum nøvnini, ið framføra á Planet Awards.

Planet Awards er á Hotel Føroyum leygarkvøldið 27. januar.

Bryan Rice er serliga kendur fyri sangin No Promises, sum hevur verið eitt stórt útvarpshitt í bæði Danmark og í Føroyum. Fyrsta útgávan hjá Bryan Rice, Confessional, hevur staðið seg so væl í Danmark, at Rice er í uppskoti til eina Zulu virðisløn sum besti sangari í 2006.

Komandi dagarnar avdúka vit fleiri onnur tónleikanøvn, ið fara at framføra á Planet Awards.

Atgongumerki til stórfingna tiltakið Planet Awards fáast til keyps í Telebúðunum í Havn, Klaksvík og Runavík. Tey kunnu eisini keypast umvegis teleshop.fo og í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Avmarkað nøgd av atgongumerkjum verða seld.



*Páll Finnur Páll hava fingið leiklutin sum Føroya fremsti syngi við bólkur*

*mynd: Jens Kr. Vang*



*Sáttmálin hjá Gestum er ein møguleiki hjá bólkinum at gerast yrkistónleikarar*

*mynd: Símun Jóannesarson*

# Gestir fáa altjóða bókingar og umboðssáttmála

**Fløgan Burtur frá Toftunum hjá Gestum er millum fløgurnar, ið eru í uppskotið sum besta fløga á Planet Awards, og at hetta val ikki er burturvið, verður nú staðfest, sambært Dimmalætting hevur bólkurin skrivað undir altjóða bókingar og umboðssáttmála**

TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Gestir hava skrivað umboðs- og bókingarsáttmála við feløgini, ið umboða Teit, skrivar Dimmalætting í gjár.

Beint fyri jól spældu Gestir jólakonsertir saman við Teiti í Vega í Keypmannahavn og í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, á konsertini í Keypmannahavn fekk danski bókingaragenturin hjá Teiti Ulrich Lauridsen, frá Glorius Records & Management eyga á bólkin og skrivaði stutt eftir sáttmála við teir um bóking av konsertum og tílíkum.

Eftir hetta varð avtala um umboðan gjørd við Plan C við Christian Ulf-Hansen og Sam Blue, ið eru umboðsmenn hjá Teiti, veit Dimmalætting.

Í mars fer Plan C til Austin í Texas á eina av heimsins størstu tónleikamessum, við sær hava teir 100 eintøk av fløguni hjá Gestum, Burtur Frá Toftunum. M.a. er ætlanin at selja tónleikin til filmar og sjónvarpsrøðir.

Tórfinnur Jákupsson úr Gestum sigur við Dimmalætting, at teir eru ovfarnir av øllum hesum og Teiti sera takksamir fyri hjálpina.

Bólkurin er samstundis farin undir samráðingar við danska útbreiðslufelagið Sonet Records, ið millum annað umboðar Høgna Lisberg, um at standa fyri útbreiðsluni av Burtur Frá Toftunum í Danmark, skrivar Dimmalætting